## Sigur er krav hjá Drátti

Leygardagin verður flogbóltsdystur á Giljanesi, tá Dráttur tekur ímóti Mjølni. Hetta verður ein dystur ímillum topp og botn, har Dráttur skal royna at halda fast um góðu støðuna í oddinum, meðan Mjølnir má royna at fanga KÍF, sum nú er farið seks stig fram um tær, aftur. Dráttur hevur havt munin á Mjølni í ár. Í fyrsta dystinum vann Dráttur sannførandi, men í øðrum setti tók Mjølnir alt á bóli, tá tær vunnu vesturi í Vágunum. Í triðja dystinum eydnaðist tó aftur Drátti at vinna, og undan dystinum í vikuskiftinum eru vágakvinnurnar eisini stórfavorittar.



## Botndystur í meistaradeildini

Lagt var upp til sannan botndyst í meistaradeildini hjá monnum leygardagin, tá ið SÍ tekur ímóti Fleyr. Undan dystinum liggur SÍ aftast við einum stigi, meðan Fleyr liggur næstaftast við fýra stigum. Hesi bæði liðini hava ligið og stríðst í botninum í alt ár, og tí verður lagt upp til ein spennandi dyst. Vinnur Fleyr dystin, so hava teir enn ein lítlan møguleika at røkka heiðursmerkjum. Fleyr hevur eisini havt munin á SÍ í ár. Av teimum trimum innanhýsis dystunum hevur Fleyr vunnið tveir, og teir eru eisini lítlit favorittur undan dystinum leygardagin.

Neistin-VB:

# VB má vinna dystin

**Um VB ætlar sær í FM-finaluna, so skulu tær vinna dystin ímóti Neistanum um vikuskiftið. Tapa tær dystin, so hevur Neistin so at siga tryggjað sær sæti í finaluni saman við Stjørnuni**

UPPTAKT
*Teitur Joense*
*teitur@sosialurin.fo*



*VB skal helst vinna dystin, um tær skulu hava nakran møguleika at røkka finaluni um meistaraheitið.*

Tvey lið hava kappast um oddasessin í Sunset deildini hjá kvinnum í at kalla alt ár. Her er talan sjálvandi um Stjørnuna og Neistan, men síðstu dystirnar er eitt triðja lið við at blanda seg í oddastríðið.

VB hevur víst sera góðar taktir í endaspælinum, og hetta hevur tryggjað teimum tveir sigrar, og eitt tepurt tap fyri oddaliðnum, Stjørnuni. Dysturin ímóti Stjørnuni var tó so javnur, at hann kundi koppað báðar vegir síðstu løtuna, og hetta fall so til fyrimuns fyri Stjørnuna, sum vann við einum máli.

Hjá Neistanum hevur ikki gingið eins væl. Gaman í hevur neistaliðið fingið eins nógv stig og VB í endaspælinum, men spælið hevur ikki verið líka sannførandi, og m.a. taptu tær stórt í báðum hálvfinalunum í Coca Cola-kappingini fyri Stjørnuni.

**Neistin havt fult tamarhald á VB**

Sjálvt um VB helst hevur víst besta spælið síðstu dystirnar, so hevur Neistin havt fult tamarhald á vágskvinnum í undanfarnu dystunum í hesum kappingarárinum.

Fyrsti dysturin ímillum liðini var í høllini á Hálsi, og tá var eingin ivi um úrslitið. Neistin vann við níggju málum, og her fekk VB ongantíð fótin fyri seg. Í seinna dystinum í grundspælinum mundu flest øll vænta ein enn meir spennandi dyst í Vági, men enn einaferð vann Neistin stórsigur. Ein 31-18 sigur í Vági talar fyri seg, og tí má Neistin eisini metast at vera favorittur undan dystinum um vikuskiftið, sum verður í høllini á Hálsi sunnudagin.

Vinna tær enn einaferð ímóti VB, so hava tær næstan tryggjað sær pláss í finaluni um meistaraheitið.

Stjørnan-StÍF:

## Stjørnan er stórfavorittur

**Stjørnan tekur ímóti StÍF í Sunset deildini sunnudagin, og her eru klaksvíkskvinnurnar stórfavorittar undan dystinum**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møtast í KÍ-høllini sunnudagin, tá ið Stjørnan tekur ímóti StÍF. Gongdin hevur verið sera góð hjá Stjørnuni í nýggja árinum. Tríggir sigrar á rað í landskappingini og tveir sannførandi sigrar í steypakappingini hava ført við sær, at liðið hevur lagt seg á ovastu rók í landskappingini og er komið í steypafinaluna.

Hjá StÍF hevur ikki gingið eins væl. Eftir seks ósigrar á rað bragdaði tó aftur seinasta vikuskiftið, tá ið Kyndil var á vitjan, og nú eru strandakvinnur eisini komnar av aftasta plássi. Hóast hetta, so er Stjørnan stórfavorittur undan dystinum, sum verður í Klaksvík sunnudagin.

Stjørnan hevur eisini havt takið á StÍF í hesum kappingarárinum. Í næsta dysti í hesum kappingarárinum spældu liðini fyrsta innanhýsis dystin á Skála, og tá var um reppið, at StÍF fór avstað við øllum. At enda dró Stjørnan tó frá og vann trygt. Í næsta dystinum var eingin ivi. Tá vann Stjørnan stórsigur í Klaksvík, og nú er spurningurin, um StÍF fer at hava nakran møguleika sunnudagin.

SÍ-TB:

# SÍ eltir oddaliðið

**SÍ skal helst vinna heimadystin ímóti TB í meistaradeildini hjá kvinnum fyri ikki at missa kontaktina við oddaliðið, ÍF**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bæði SÍ og TB hava verið partar av oddastríðnum í hesum kappingarárinum í meistaradeildini hjá kvinnum, men seinastu dystirnar hevur TB mist sína góðu støðu í oddinum. Nú eru í veruleikanum bert trý lið, sum liggja og kappast um meistaraheitið, og eitt av teimum er SÍ úr Sørvági.

Leygardagin taka tær ímóti TB í fimleikahøllini í Sørvági, og tann dysturin skal helst vinnast, um tær ikki skulu missa kontaktina við oddaliðið, ÍF. Hjá TB ræður eisini um at vinna, tí vinna tær dystin, so kunnu tær leggja seg undir liðina á SÍ, og við hesum blanda seg uppí aftur heiðursmerkjastríðið.

Gongdin hevur verið góð hjá kvinnunum úr Sørvági síðstu dystirnar. Síðstu tríggir dystirnir eru endaðir við sigri, og tí ætla tær heilt víst at halda fast um góða spælið, sum liðið hevur víst síðstu dystirnar.

SÍ møtir eisini einum liði, sum er í einum aldudali. Í trimum teimum seinastu dystunum hevur TB ikki fingið nakað stig. Tær hava tapt fyri KÍF, Drátti og ÍF, og tí hava tær eisini mist sína góðu støðu í oddinum.

**TB hevur havt munin**

Hesi bæði liðini hava møtt hvørjum øðrum tríggjar ferðir í hesum kappingarárinum. Tvær ferðir hava liðini spælt í Trongisvági og einaferð í Sørvági, og TB má sigast at hava havt lítla yvirvág.

Í fyrsta dystinum í grundspælinum, sum var í Trongisvági, eydnaðist TB at vinna ein sannførandi 3-0 sigur. Tann dystin var SÍ tó ikki veruliga komið í gongd, men næsta dystin vístu tær styrki.

Í seinna dystinum í grundspælinum, sum var í Sørvági, fekk heimaliðið eina keðiliga byrjan, tá TB vann fyrstu tvey settini. SÍ vildi tað tó øðrvísi, og síðstu trý settini fullu til fyrimuns fyri SÍ, sum vann dystin 3-2.

Í fyrsta dystinum í endaspælinum møttust liðini aftur, og enn einaferð var TB oman á. Tær vunnu 3-1, so um vit taka samanum, so hevur TB havt munin. TB hevur tó ikki spælt nakað serliga væl seinastu dystirnar, meðan SÍ so sanniliga hevur rakt formin. So undan dystinum má SÍ metast at vera rættiliga stórur favorittur.